# Gulllaksamaskinurnar til Vágs

**Flakamaskinurnar, sum vórðu settar upp til at arbeiða gulllaks við á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, verða fyrsta dagin fluttar til Vágs**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Gulllaksamaskinurnar, sum hava staðið á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, verða nú fluttar til Vágs, har tær skulu setast upp á gamla Polarfrost*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Føroya Fiskavirking fer nú at gera seg út til at arbeiða gullaks á virkinum í Vági. Maskinurnar verða fluttar úr Miðvági til Vágs fyrsta dagin.

Fyri einum trimum árum síðan gjørdi Føroya Fiskavirking eina rímiliga stóra íløgu í flakamaskinur, sum skuldu skera gulllaksafløk. Maskinurnar vórðu settar upp í Miðvági, men vóru bara í gongd eina stutta tíð. Eingin gulllaksur varð arbeiddur á virkinum í Miðvági í fjør, og nú verður maskinurnar tiknar niður og fluttar til Vágs.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur, at grundin til at gjørt er av at flyta maskinurnar til Vágs, er tann, at tey vænta at kunna fáa meira burtur úr gulllaksaframleiðslu í Vági, av teirri grund, at tað eru betri goymsluviðurskifti á virkinum í Vági, enn tað er í Miðvági.

Gulllaksur verður framleiddur til goymslu, sigur Meinhard Jacobsen. Stórar nøgdir í senn, og so verður avskipað so hvørt, selt verður.

Í fjør varð eingin gulllaksur arbeiddur í Miðvági yvirhøvur, tað komst av, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking, at marknaðurin var so vánaligur. Dollarin var veikur, og tí fekst ov lítið burturúr. Tað liggja enn eini 200 tons av gulllaksavørum á goymslu í Miðvági.

Meinhard Jacobsen sigur, at tey í løtuni arbeiða við at leggja til rættis eina arbeiðsætlan fyri saltfiskaframleiðsluna, sum væntandi nakað skjótt fer at byrja í Vági. Finnast skal fram til, hvørjar maskinur skulu brúkast. Um okkurt skal keypast, og hvussu uppseting og slíkt skal gerast. Fólk er sett, sum nú skal setast inn í tingini, áðrenn farið verður í gongd.




# 500 tunnur til børn og vaksin

**– Okkara tunnur eru góðar. Tær brotna ikki við fyrsta slag, sigur Páll Skýlindal, sum í trý ár hevur selt tunnur á MJ Saltsøluni**

FØSTULÁVINT
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Páll Skýlindal hevur í trý ár selt tunnur hjá MJ Saltsøluni. Í ár bíløgdu teir 500 tunnur, men nú eru bert einar 100 eftir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nú nærkast til føstulávint. Og fyri mong vaksin og børn merkir tað, at tunnurnar nú skulu fáast til vega.

Ein teirra, sum hevur søluna um hendi er MJ Saltsølan, sum í ár hevur bílagt 500 tunnur í trimum støddum til landið.

Tunnurnar komu til landið fyrr í farna mánaði úr Norðurnoregi, og longu nú eru tær allar flestu seldar.

– Eg meti, at vit hava einar 100 eftir sum nú er, sigur 20 ára gamli Páll Skýlindal, sum m.a. tekur sær av søluni av tunnunum hjá MJ Saltsøluni.

Saman við einum øðrum starvsfelaga er Páll til arbeiðis hjá fyritøkuni, sum heldur til á Vestaru Bryggju í Havn. Har ger hann alt møguligt – m.a. koyrir hann trukk, gravimaskinu, umframt tað at hann selur salt og tunnur.

## Ikki bara sesongvøra

Hjá eini fyritøku er tað altíð at spennandi at vita, hvussu sølan av eini vøru gongur ár eftir ár – eisini tá talan er um tunnur til tunnusláing.

Tunnur verða jú fyri ein stóran part bert seldar nú í føstulávints-sesongini, men Páll sigur kortini, at tað koma javnan fólk og spyrja um tunnur aðrar tíðir av árinum.

– Hetta eru fólk, sum ynskja at salta ymiskt niður í okkara tunnur. Og tað vísir seg tí, at hóast vit ikki selja allar tunnurnar beinanvegin, so er eingin tunna eftir, tá summarið er komið, sigur hann.

Fyri at lætta um hjá teimum, taka teir ikki ímóti bíleggingum av tunnum. Skal ein vera vísur í at fáa eina tunnu, er neyðugt at gjalda fyri hana frammanundan. Fyrst tá, verður hon løgd til viks. Til ber eisini at keypa tunnur á staðnum.

Tað er serliga skúlar, barnagarðar, virkir, feløg og stovnar sum keypa sær tunnurnar, men eisini arbeiðsfólk á virkjum og fyritøkum taka seg saman og keypa eina tunnu í felag.

Tað finnast tríggjar støddir av tunnum, og tí er gjørligt at fáa tunnur, bæði til vaksin, stór børn og til tey smæstu børnini.

– Hetta eru góðar tunnur, skal eg siga tær. Tær eru ikki sum onkrar aðrar, sum brotna vit fyrsta slag!, sigur Páll.

